tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. juni 2020 kl. 16:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Bjarni Hammer, Anita Vibergsdóttir, Bogi Johannesen, Alvi Mortensen, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen
Skrivari: Fróði Mortensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar

**Pkt. Tekstur** **Síða**


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Samanbering av skattainntøkum: jan-mai 2020 | 2 |
| 2 | Roknskapur 2019 | 5 |
| 3 | Teldur til Tvøroyrar Skúla | 7 |
| 4 | Tvøroyrar Skjalasavn -stuðul til almenna móttøka 3. juli 2020 | 10 |

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. juni 2020 kl. 16:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.34.00-1-20**

## 1. Samanbering av skattainntøkum: jan-mai 2020

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 11. juni 2020.**
Samanbering av skattainntøkum mnd. jan-mai 2020/2019. Tvøroyrar kommuna hevur eina afturgongd uppá -1,49% , svarandi til kr. -377.182,- tilsamanbering millum ár 2019 og 2020.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. juni 2020 kl. 16:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Fyribilsskattur fyri januar og mai - samanlagt:

| Kommuna: | 2019 | 2020 | Munur kr. | Munur % |
|---|---|---|---|---|
| Fugloyar | 732.529 | 926.941 | 194.412 | 26,54 |
| Viðareiðis | 6.424.328 | 5.979.663 | -444.665 | -6,92 |
| Hvannasunds | 6.437.198 | 6.618.121 | 180.923 | 2,81 |
| Klaksvíkar | 88.756.966 | 94.339.014 | 5.582.048 | 6,29 |
| Kunoyar | 2.326.214 | 2.450.601 | 124.387 | 5,35 |
| Fuglafjarðar | 29.166.642 | 30.493.096 | 1.326.454 | 4,55 |
| Eystur | 35.609.396 | 38.010.035 | 2.400.639 | 6,74 |
| Nes | 21.134.025 | 22.278.479 | 1.144.454 | 5,42 |
| Runavíkar | 69.115.945 | 73.192.929 | 4.076.984 | 5,90 |
| Sjóvar | 16.758.132 | 17.884.576 | 1.126.444 | 6,72 |
| Eiðis | 10.333.779 | 10.916.774 | 582.995 | 5,64 |
| Sunda | 30.733.963 | 30.318.919 | -415.044 | -1,35 |
| Kvívíkar | 9.733.354 | 10.399.479 | 666.125 | 6,84 |
| Vestmanna | 20.513.303 | 20.262.696 | -250.607 | -1,22 |
| Vága | 33.343.048 | 34.401.189 | 1.058.141 | 3,17 |
| Sørvágs | 19.559.438 | 19.742.701 | 183.263 | 0,94 |
| Sands | 7.067.932 | 7.412.613 | 344.681 | 4,88 |
| Skopunar | 6.387.090 | 6.980.671 | 593.581 | 9,29 |
| Skálavíkar | 2.379.083 | 2.491.532 | 112.449 | 4,73 |
| Húsavíkar | 1.295.369 | 1.463.344 | 167.975 | 12,97 |
| Skúvoyar | 497.703 | 521.382 | 23.679 | 4,76 |
| Hvalbiar | 9.303.783 | 9.507.820 | 204.037 | 2,19 |
| Tvøroyrar | 25.382.153 | 25.004.971 | -377.182 | -1,49 |
| Fámjins | 1.030.979 | 1.001.162 | -29.817 | -2,89 |
| Hovs | 1.334.578 | 1.270.796 | -63.782 | -4,78 |
| Porkeris | 4.159.337 | 4.378.601 | 219.264 | 5,27 |
| Vágs | 18.626.619 | 19.061.526 | 434.907 | 2,33 |
| Sumbiar | 4.229.074 | 4.018.431 | -210.643 | -4,98 |
| Tórshavnar | 338.302.765 | 357.466.953 | 19.164.188 | 5,66 |
| | **820.674.725** | **858.795.015** | **38.120.290** | **4,64** |



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. juni 2020 kl. 16:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |









Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. juni 2020 kl. 16:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Fíggjarnevndin, 15. juni 2020, pkt. 1:**
Málið var kunna og umrøtt

**Avgerð**

Málið var viðgjørt og kunna

**00.32.10-S00-1-20**

## 2. Roknskapur 2019

**Málsfrágreiðing**

**Kommunustjórin 11.06.2020**
Borgarstjórin, Fíggjarleiðarin og Kommunustjórin hava gjøgnumgingið roknskapin fyri Tvøroyrar kommunu 2019, sum er grannskoðaður av Løggilda grannskoðaravirkinum Januar.

Vísandi til § 46 í kommunustýrislógini verða roknskapur og grannskoðanarprotokoll løgd fyri fíggjarnevndina at góðkenna. Um fíggjarnevndin ongar viðmerkingar hevur, beinir nevndin roknskapin og protokollina í býráðið at viðgera/góðkenna. Býráðið skal eisini taka støðu til val av grannskoðara. Greinin er soljóðandi: "Í samband við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur. Stk. 2. Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum".

- Í samband við fíggjarliga partin verður víst til s. 12 í ársroknskapinum (fíggjarstøða)
- Protokollini: Talva sum vísur samanbering av roknskapi við fíggjarætlan og fíggjarliga , talva sum vísur samla skuld í mun til álíkning, yvirlit fyri inntøkur síðstu 5 árini.

Í fíggjarætlanini fyri 2019 varð roknað við einum halli á 24.303 tkr. Ætlanin var at niðurrinda skuld við 3.377 tkr., og at aðrar fíggjarbroytingar vóru á 27.680 tkr. Netto gevur hetta 24.303 tkr. Ársroknskapurin vísir eitt hall á 20.675 tkr. Hetta gevur ein nettomun millum fíggjarætlan og roknskap á 3.628 tkr. Niðanfyri er útgreining av, hvussu hesin munur er nýttur:

Broytingin er nýtt soleiðis:
- Broyting í áogn, peningi og aðrari skuld 572
- Broyting í lániskuld 0
- Broyting í gjaldføri -4.200



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. juni 2020 kl. 16:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Vísandi til høvuðseftirlitið í ársroknskapinum fyri 2019 hjá Tvøroyrar kommunu, er nettomeirnýtsla staðfest á einari grein. Flestu greinir hava minninýtslu í mun til ætlanina. Meirnýtsla er m.a. staðfest í Almanna- og heilsumálum. Hetta kemst serliga av, at tað í 2019 hevur víst seg, at útreiðslurnar til Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy vóru 3.266 tkr. hægri enn tað, sum kommunan hevði við í fíggjarætlanini fyri 2019. Í løgunum er meirnýtsla staðfest á einari grein. Talan er um Børn og ung, har meirnýtslan er viðvíkjandi nýggja barnagarðinum. Í inntøkunum er staðfest ein meirinntøka á 3.081 tkr.

Fíggjarliga gongdin: Samlaði raksturin hjá kommununi er í 2019 68.892 tkr., og er nakað hægri enn undanfarna ár, tá hann var 65.440 tkr. Hækkingin er á 5,3%. Inntøkurnar hjá kommununi eru á 86.539 tkr. og eru nakað hægri enn undanfarna ár, tá tær vóru 85.499 tkr. Hækkingin er á 1,2%. Á løgusíðuni hevur kommunan nýtt 38.323 tkr. í 2019 samanborið við 11.107 tkr. í 2018. Løgur hava serliga verið gjørdar á økjunum: Kommunufyrisitingin 776 tkr., Spæliplass 1.019 tkr., Barnagarðurin 15.606 tkr., Fólkaskúlin 1.543 tkr., Umsiting og røkt av fastognum 4.704 tkr., Vatnveiting 4.575 tkr., Kloakkir 847 tkr., Vegir 3.856 tkr., Sløkkiliðið 1.923 tkr., Tvøroyrar havn 1.382 tkr. og Bátahavnin 1.211 tkr.

Samla skuld í mun til álíkning:

*Samlað skuld í mun til álíkning*

26 Niðanfyri er eitt yvirlit yvir nettoskuld í mun til álíkning:

| | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettoskuld ultimo (tkr.) | -40.541 | -20.053 | -29.024 | -37.894 | -45.212 |
| Álíknaður skattur umr. til 23 % | 66.220 | 66.762 | 63.642 | 61.271 | 58.389 |
| Svarandi til álíkning | -0,61 | -0,30 | -0,46 | -0,62 | -0,77 |

Álíknaður skattur og nettoskuld eru roknað út eftir leiðreglum hjá Fíggjarmálaráðnum.

**Fíggjarnevndin, 15. juni 2020, pkt. 2:**
Rokniskapurin var gjørgnumgingin og einmælt samtyktur.

**Avgerð**



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. juni 2020 kl. 16:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Roknskapurin var einmælt samtyktur uttan viðmerkingar, og einmælt samtykt at velja sama grannskoðara fyritøku til komandi ár.

**17.35.00-Ø40-1-20**

## 3. Teldur til Tvøroyrar Skúla

### Málsfrágreiðing

**Umsókn frá skúlastjóranum dagft. 07.05.2020, um játtan til keyp av teldum til Tvøroyrar Skúla.**

Til Tvøroyrar Kommunu

Nú er tíðin komin at taka næsta stig á telduøkinum.

Útbúnaðurin vit hava í dag er settur saman soleiðis, - um vit fara aftur til 2009 so fingu vit teldur til teldustovuna, 18 fastar teldur. Í 2012 eitt sett av teldum, sum bert blivu brúktar til próvtøkurna og activ inspire talvur og nec uppvørpur til hesar í allar skúlastovurnar . Í 2014 fingu vit 24 teldur við 2 telduvognum, sum standa fast í Trongisvági. Í 2015 keyptu vit 4 stationærar teldur til skúlahúsið. Hartil hava vit í 2016 keypt 6 teldur, sum primært vera nýttar av førleikastovuni. Samanumtikið kann ein siga, at KT-útbúnaðurin hjá Tvøroyrar skúla er rættuliga gamal, og tí, í summum førum so at siga óbrúkiligur.

**Tað eru fleiri orsøkir til, at vit søkja um játtan.**

- Gongdin hevur lagað tað so, at tær teldurnar, sum blivu brúktar til próvtøkur, nú standa úti í skúlastovunum, til næmingar, sum nýta cd-orð, og í skúlahúsinum. Nakrar fáar teldur eru eftir at nýta til verkætlanir og annað. T.v.s. vit hava ongar teldur til "vanliga undirvísing".
- Tá vit hava próvtøkur, hava vit tað soleiðis, at næmingarnir í mest møguligan mun taka sína egna teldu við. Hendan støðan er ikki nøktandi, tí fleiri og fleiri næmingar helst vilja hava teldu frá skúlanum, tí hendan lýkur alt tey skulu brúka til próvtøkuna. Henda gongdin ger at vit ikki hava teldur at lata øllum næmingunum sum ynskja tað.
- Til landsroyndirnar er 4. flokkur í Trongisvági og brúkar teldurnar í telduvogninum. 6 flokkur sum er 26 næmingar situr partvíst í teldustovuni og ein partur í fundarhølinum.
- Tíðin er farin frá teldustovum. Vit ætla tí at avtaka teldustovuna, sum so verður brúkt sum vanlig skúlastova.
- Teldur og teldlar verða nýttir meira og meira í tí dagligu undirvísingini. Tá er tað sera hent at lærarar og næmingar hava atgongd til teldur.



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. juni 2020 kl. 16:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

- Um vit hyggja eftir árstølunum so síggja vit, at vit nú flyta okkum frá at hava hoskandi teldur og amboð, til at vera eftirbátur á hesum øki.
- Nú koronasmittan kom á okkum, og allir næmingar skúlans vóru sendir heim, stóðu vit brádliga við einum alstórum trupulleika. Heilt nógvir næmingar manglaðu teldur og kundu tí ikki taka ímóti fjarundirvísing. Allar tøkar teldur í skúlanum blivu lántar út, og eru í løtuni heima hjá næmingum.

Vit hava tosað við aðrar skúlar, og er tað ymiskt, hvussu teir loysa KT-spurningin. Summir geva næmingunum ein teldil í part, meðan aðrir hava farteldur á skúlanum í minsta lagi 80 (Fuglafjarðar skúli).

Ætlan skúlans er at keypa 60 nýggjar farteldur, tí so meta vit, at vit nøkta tørvin her og nú.

Skúlin hevur ikki havt eina langtíðarætlan á KT-økinum, hetta halda vit er umráðandi, so íløgurnar kunnu strekkjast yvir fleiri ár.

Vit hava fingið tilboð frá Nema, Formula og Aktiv. (sí viðheftu skjøl).

**Kommunustjórin 07.05.2020**
Tvøroyrar Skúli hevur arbeitt við einari ætlan um at útskifta gomlu teldurnar, og ístaðin keypa nýggjar tíðarhóskandi teldur til næmingarnar. Hetta er blivið meira átrokandi og aktuelt, nú Korona kreppan hevur viðført, at neyðugt hevur verði við fjarundirvísing.

Ætlan skúlans er at keypa 60 nýggjar farteldur, fyri at nøkta tørvin her og nú. Tvøroyrar Skúli hevur vent seg til aðrar skúlar fyri at hoyra um teirra royndir, og skúlin hevur móttikið tilboð frá 3 veitarum.

Teldur eru eitt týðandi arbeiðsamboð í nútíðarsamfelagnum og er eisini vorðin eitt týðandi amboð í fólkaskúlanum. Fyri at tryggja, at allir næmingar hava tíðarhóskandi skúla amboð, sum eru javnt góð, verður mælt til, at skúlin á hvørjum ári keypir teldur, svarandi til talið av einum nýggjum árgangi av næmingum, soleiðis at málið er, at allir næmingar frá 4. til 10. flokk hava egna teldu.

Mælt verður til, at næmingarnir gjalda eitt depositum fyri teldurnar, sum næmingarnir fáa aftur, tá teldan verður latin inn aftur.

Krav til teldukeyp á hesum sinnið er:

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. juni 2020 kl. 16:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

HP Elitebook 840G3
14" Full HD skærm 1920x1080
Intel Core i5-6200 SkyLake
8GB RAM
256GB SSD
USB-C, USB 3.0, DisplayPort, Dock connection
Vægt kun 1,54 kilo og 17,8mm tynd
Windows 10 Pro
2 års garanti.

Neyðugt er við eykajáttan, tá peningur ikki er avsettur til hetta á fíggjarætlanini fyri árið 2020.

**Mentanarnevndin, 11. maj 2020, pkt. 3:**
Einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá Aktiv uppá 40. stk. teldur fyri kr. 149.920,- ex.mvg. Málið verður beint í Fíggjarnevndina. Umsitingin heitur á leiðsluna í Tvøroyrar Skúla um at innlata uppskot til teldur/útbúnað til FÆ2021, og gera eina langtíðarætlan á KT økinum. Málið verður beint í fíggjarnevndina

**Fíggjarnevndin, 20. maj 2020, pkt. 10:**
Einmælt samtykt, at fylgja tilmælið frá Mentanarnevndini og taka av tilboðnum frá Aktiv uppá 40. stk. teldur fyri kr. 149.920,- ex.mvg. Fíggingin verður veitt við eykajáttan.

**Býráðið, 27. maj 2020, pkt. 4:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini, at játtanin verður veitt við eykajáttan.

## Fígging

kr. 149.920,- ex.mvg

•

**Kommunustjórin 29.05.2020**
Onnur viðger av eykajáttan til keyp av teldum til Tvøroyrar Skúla. Mælt verður til at fíggja hetta av konto 411 "Íløga til skúla", har avsett er á FÆ2020 kr. 2.830.200,-

**Avgerð**



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. juni 2020 kl. 16:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Einmælt samtykt, og at keypið verður fíggja av konto 411 "Íløga til skúla".

**19.02.00-Ø40-1-20**

## 4. Tvøroyrar Skjalasavn -stuðul til almenna móttøka 3. juli 2020

### Málsfrágreiðing

Kommunustjórin 11.06.2020
Umsitingin hevur fingið umsókn um stuðul til at skipa fyri almennari móttøku at nú Tvøroyrar Skjalasavn letur upp 3. juli 2020. Kostnaðurin av tiltakinum verður fyribils mettur til kr. 20-30.000,-, har mælt verður til at hetta verður fíggja av §522 stuðul til mentan.

**Fíggjarnevndin, 15. juni 2020, pkt. 5:**
Einmælt samtykt at Tvøroyrar kommuna skipa fyri almennari móttøku nú Tvøroyrar Skjalasavn letur upp 3. juli 2020, og kostnaðurin verður fíggja av §522 stuðul til mentan.

### Avgerð

Máli var kunna, og umsitingin finnur fígging.



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. juni 2020 kl. 16:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin**

**Fundur lokin kl. 17:15**

Kristin Michelsen

Bjarni Hammer

Anita Vibergsdóttir

Bogi Johannesen

Alvi Mortensen

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen



Formansváttan